# Pedagogur til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna í Króki verður søkt eftir einum pedagogi 40. t. viku, at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 3.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs, leiðara tlf. 225222/444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. januar 2006 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 19. desember 2005

**Fuglafjarðar býráð**

# Landsfundur

Landsfundurin hjá Føroya Fiskimannafelag verður í Norðurlandahúsinum tann 29. desember. Byrjað verður kl. 10.00 og hidið verður á út á seinnapartin.

Skráin verður tann vanliga fyri landsfundin, fyrst og fremst ársfrágreiðing, roknskapur og ásetan av limagjaldi.

Gestarøðari verður Petur Steingrund, fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni. Fiskifrøði er eitt evni, sum er av stórum áhuga hjá fiskimonum, so vit vóna at menn fara at møta upp og nýta møguleikan at lurta og at seta spurningar á røttum stað. Hetta kann eisini gagna fiskifrøðingum í teirra arbeiði.

Teir, sum hava útreiðslur av luttøkuni, fáa tær endurgoldnar.

Føroya Fiskimannafelag

# Borivognur til sølu

Ein ROC 712 HC-00 borivognur v/ kabinu.
Borar 27 m v/ T38
Hamarin er COP 1238 LP
2 ára gomul beltir
Spæl aftan
Oljufýr í kabinu
Àrg. 1987.

Àhugað kunnu síggja/royna vognin í grótbrotinum hjá Klaksvíkar kommunu.

Minsta boð er kr. 60.000,- + mvg.

Ringjast kann á tlf. 22 82 80

**Klaksvíkar Býráð**

KEYP SPORTSFELGUR...





LÆTT OG TRYGT

...við dekkum á alnótini

WWW.NORMEK.FO

FO-512 NORÐRAGØTA · TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

## Saltspreiðarar og saltkassar





**Kaj Andreasen & Co**

BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

*Viðskiftafólki okkara verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár*

STATSAUTORISERET FODTERAPEUT

**KLINIKKIN FYRI FÓTTERAPI**

*Dagmar Andrea Svabo*
**TJARNARDEILD 2**

## Elektrikari

**Elektrikari søkist til áhugavert el-arbeiði. Tú má kunna arbeiða sjálvstøðugt. Góð kor til rætta fólkið.**

Skrivlig umsókn at senda til.

elmek
Gripsvegur 18.
100 Tórshavn
tlf: 317352

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480



19. januar 2006

# LÍVSNEYÐUG RÁÐSTEVNA!

**Hárini reisast - áh nei, enn eitt offur... Fyrstu tíðindini eru komin inn í heimið...**

Er arbeiði títt so ella so tengt at ferðslu/ferðslutrygd í Føroyum?

Saman við Ráðnum fyri Ferðslutrygd, seta vit á 30 ára degi teirra fokus á ferðslu, trivna og býarplanlegging.

Fá íblástur frá útlendskum og føroyskum fyrilestrahaldarum:

- **Cities for People**
- **Klippikortið í Danmark**
- **Ferðslumentan er meira enn bara ferðslumentan**
- **Hví er lógararbeiði so týdningarmikið?**
- **Null-hugsjónin - utopi ella veruleiki?**
- **Kjak í paneli - Hvussu skal ferðslutrygd skipast í Føroyum?**

Synergi

Tilmelding og meira um tiltakið á www.synergi.fo
tel 22 RING (22 74 64) · fax 322 355 · synergi@synergi.fo